# BÓKASÍÐAN

*bøkur, bøkur, bøkur…*



Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard
anna@sosialurin.fo

Krimi:

## Inn kemur Dagliesh ...

P.D. James, *The Lighthouse*, Random House, 2005




P.D. James "the grand old lady of crime" er ikki til at steðga. Og enn einaferð hevur hennara nýggjasta krimisøga alt, ein Adam Dagliesh fjeppari kann ynskja sær. Í *The Lighthouse* hava hendingarnar flutt seg úr London, út á oynna Combe Island beint uttanfyri Cornwall, har kend fólk leita sær skjól fyri pressuni. Talið á føstum íbúgvum á oynni er avmarkað og trygdin er í hásæti. Tess meir skelkandi er tað, tá ein týdningarmikil persónur verður funnin dripin á oynni.

Av tí at morðið kann fáa politiskar avleiðingar, má uppkláringin leggjast í hendurnar á ovastu leiðsluni í løgregluni. Inn kemur Commander Adam Dagliesh og hansara lítla serlið av dugnaligum detektivum, hvørs veikleikar og styrkir verða hegnisliga lýstir av høvundanum, sum er til staðar allastaðni.

Sum altíð hjá P.D. James er morðið og fyri tann skuld eisini uppkláringin bara ein síðusøga, sum skal dríva veruligu søguna frameftir. Tað, sum hevur minst líka stóran áhuga, eru mannalagnurnar, sum av onkrari orsøk hava leitað sær skjól á hesi oynni, sum høvundurin hevur uppfunnið til høvið. P.D. James er ein sannur meistari í at avúka hesar lagnur gjøgnum avhoyringarnar hjá Dagliesh, sum ikki er vorðin minni sjarmerandi arrogantur og gløggur við árunum.

Kanon:

## Men hvat skal man brúka tað til?




Mikumorgunin almannakunngjørdi danska mentamálaráðharrin, Brian Mikkelsen, so umsíðir nógv umrøddu kultur kanonina, yvirlitini yvir dygdarbestu donsku listaverkini, sum 35 fólk í 8 nevndum hava valt út.

Eins og innan hinar listagreinarnar, fær bókakanonin bæði rís og rós frá ummælarum. Fólk tykjast samd um, at ávís val eru uppløgd og røtt, meðan tey samstundis undrast stórliga á, at ávís verk ikki eru komin við.

### Dan ella Duck

Altíð kjakfúsi Lars Bukdahl á Weekendavísini saknar meir "sýru og vanskapningar" á bókalistanum og heldur, at Karen Blixen átti at verið umboða við *Syv gotiske fortællinger* heldur enn *Vinter Eventyr*. Og hvar eru stóru donsku litteleru kommunistarnir sum Sherfig, Andersen Nexø og Gelsted, spyr Bukdahl, sum heldur ikki fær inn í sín knokk, hvussu ein kulturkanon kan kallast donsk, uttan at Dan Turell er við í henni.

Á Politiken staðfestir Bjørn Bredal turrisliga, at okkurt kundi bent á, at Útlendingastýrið hevur havt ein fingur við í spælinum og tískil hevur bannað Ibsen og Hamsun atgongd. Hinvegin er rættiligt rumbul í reaktiónunum kring barna kanonina, har fólk hava ilt við at svølgja, at ein so amerikansk uppfinning sum Dunnaldur Dunna er sloppin við.

### Tak støðu!

Kjakið um, hvør átti at verið við ella ikki, kann uttan iva halda fram til dómadag. Minst líka áhugavert er tað at spyrja, sum miðnámsskúlanæmingurin á tíðindafundinum mikudagin: "Tað kann gott vera, at tit hava sagt tað fleiri ferðir, men eg havi also framvegis ikki rættiliga skilt, hvat vit skulu brúka hasa kultur kanonina til?" Tjaa, eisini tað kunnu vit ivaleyst kjakast leingi um, men eitt av skilagóðu svarunum, hann fekk, kom frá filmleikstjóranum Susanne Bier, sum segði: "Hetta er ikki nakað tit skulu duga uttanat. Men tað skal noyða tykkum at taka støðu", sum væl merkir á leið tað sama, sum tað, formaðurin fyri kanon-nevndina fyri bókmentir segði, tá arbeiðið byrjaði

"Við at koma við nøkrum dømum um nakað, sum vit halda vera gott, skapa vit eitt kjak um, hvørt tað nú eisini er rætt, og hvat tað eru fyri treytir, metingin byggir á. Tað kjakið fer í sær sjálvum at hække støðið í mátanum, vit umgangast bókmentir."

Júst hatta kjakið kundu føroyskar bókmentir uttan iva eisini havt brúk fyri ...

Til ber at síggja kanonyvirlitini á *www.dr.dk/kanon*

Framsýning:

## Tjóðsangurin 100 ár








Í sambandi við at tað í ár eru liðin 100 ár, síðani tjóðsangurin "Tú alfagra land mítt" varð yrktur, hevur Føroya Landsbókasavn gjørt eina lítla framsýning um tjóðsangin.

Á framsýningini er høvið at síggja upprunahandritið til yrkingina, "Mítt alfagra landa", ið var heitið á yrkingini, sum Símun av Skarði skrivaði 1. februar 1906, og sum seinni gjørdist tjóðsangur okkara umframt upprunahandritið til lagið til tjóðsangin, sum Peter Alberg gjørdi í 1907. Eisini verða ymiskar týðingar av tjóðsanginum til onnur mál at síggja á framsýningini, sum letur upp mikudagin 1. februar.

Heimspeki:

## Stórir tankar

Giovanno Borradori, *Filosofi i terrorens tid*, Informations Forlag, 2005




Eitt sindur av tilvild vóru tveir av tíðarinnar størstu teinkjarum Jürgen Habermas og Jacques Derrida í New York 11. september 2001. Og ikki óvæntað gjørdu teir sær sínar tankar um tað, teir sóðu. Ein triði heimspekingur, Giovanna Borradori, var skjót at hugsa stórt og setti sær fyri at fáa eitt prát við Habermas og Derrida um tað, teir hugsaðu. Úrslitið er framúr áhugaverda bókin *Filosofi i terrorens tid*, sum uttan iva verður samtíðarinnar týdningarmesta verk um yvirgang.

Í samrøðunum venda Habermas og Derrida okkara fatan av yvirgangi á høvdið og bróta við vanliga retorikkin kring gott og ónt. Teir koma víða um við hugleiðingum um upprunan til yvirgang, grundarlagið, ið vesturlendsk mentan byggir á, framtíðina hjá fólkaræðinum og í hvønn mun heimspekin kann gera sítt til at skapa eina meir rættvísa heimsskipan.

Habermas og Derrida tosa út frá hvør síni heimspekiligu siðvenju, samstundis sum teir umboða tvey tey mest ráðandi rákini í modernaðari hugsan. Men bókin er ikki bara ein framúr áhugaverd innleiðsla í tankauniversini hjá tveimum av tíðarinnar størstu heimspekingum. Við at brúka teirra ástøði til at greina eina heilt ítøkiliga hending, sum vit øll onkursvegna hava "upplivað", verða teir munandi lættari at fata, enn teir annars ofta tykjast.

**Stórar, tjúkkar, tunnar, smáar, langar…**
Á Føroyaprent eru allar bøkur vælkomnar
Vit hava drúgvastu royndirnar innan bókaprent

FØROYAPRENT
Hoyvíksvegur 59 | 110 Tórshavn | Tel. 314 555 | www.foroyaprent.fo